*KJ-Hydraulik í Fuglafirði:*

# Fyrireika seg nú til oljuvinnu í Føroyum



Sofus Gregersen tv. her saman við Svein Askildsen á básinum hjá Saga á oljumessuni í Stavanger herfyri. Man tað vera slíkur boripallur sum hesin, sum virki sum KJ-Hydraulik einaferð í framtíðini fara at lata útgerð og tænastur til? Mynd Jan

*-Málið hjá okkum í dag er at royna at vera við í eini verandi oljuvinnu í útlandinum og kunna gera okkurt smátt, sum vit eru førir fyri í samráð við virki har. Harvið kunnu vit vera uppá forkant við ta oljuvinnu, sum møguliga skjótt verður í Føroyum. Hetta sigur sølustjórin hjá KJ-Hydraulik í Fuglafirði, Sofus Gregersen, sum í dag er ein av teimum fyrstu tann føroysku fyritøkunum, sum ítøkiliga er farin at fyrireika seg til eina komandi oljuvinnu.*

Jan Müller

KJ-Hydraulik í Fuglafirði er ein av teimum fyribils fáu ídnaðarfyritøkunum í Føroyum, sum miðvíst er farin at kanna møguleikarnar fyri at vera við í eini komandi oljuvinnu í føroyskum øki.

Men fyri at kunna gera seg tilreiðar til hesa uppgávu, so er neyðugt at útvega sær nýggja vitan og somuleiðis at fáa samband við fyritøkur í útlandinum, sum í dag arbeiða í oljuvinnuni.

Sofus Gregersen er sølu- og marknaðarstjóri hjá KJ-Hydraulik og var hann saman við Svein Askildsen, sum útbúgvir seg á Den Danske Eksportskole, á oljuframsýningini í Stavanger herfyri.

**Vitan og konkaktir**

Vit hava spurt Sofus, hví teir fóru á framsýningina og hvat teir fingu burtur úr?

Høvuðsorsøkin var tann, at vit vildu kanna, hvat tað krevst fyri at vera við í eini oljuvinnu. Síðani at finna fram til, hvørji virki og fyritøkur eru við á marknaðinum og at enda fáa ein dialog við nøkur virki, sum longu eru í vinnuni.

Sofus Gregersen sigur, at teir royndu eisini at gera heimaarbeiðið, áðrenn teir fóru avstað og høvdu m.a. avtalað fundir við fyritøkur.

Framsýningin var eitt sera gott høvi at koma á tal við fólk og virki, sum arbeiða í oljuvinnuni og kanska serliga virki, sum arbeiða innan somu bransju sum KJ-Hydraulik.

Sofus Gregersen heldur sjálvur, at teir fingu heilt fitt burtur úr túrinum.

-Vit fingu ikki pengar burturúr, men vit hava fingið vitan og kontaktir og eisini skapt virkinum eitt álit, sum byggjast kann víðari á. Vit hava m.a. tosað við nøkur virki í Noregi um at kunna senda fólk úr Føroyum í eina tíð til teirra at læra seg upp í ymiskum, sum hevur við oljuvinnuna at gera. Tá hesi fólk koma heimaftur ger henda vitan tað møguligt hjá okkum at vera við í oljuvinnuni longu áðrenn hon er komin til Føroya.

Sofus Gregersen vísir á, at teir á henda hátt kunnu bjóða uppá nøkur undirleverandørsarbeiði til verandi oljuvinnu í Noregi ella aðrastaðni.

Talan er um at senda verkfrøðingar ella dugnalig maskinfólk til Noregs. Spurningurin í fyrstu atløgu er tó at fylgja við og hava fingurin á pulsinum.

**Kværner stóran áhuga fyri Føroyum**

Høvi varð at hitta umboð fyri fleiri ymisk virki og feløg á framsýningini. M.a. tosaðu teir við fólk frá Phillips og Saga men ikki minst var vitjanin hjá Kværner áhugaverd.

Vit tosaðu við varastjóran hjá Kværner. Teir vóru sera positivir fyri eini samvinnu við Føroyar í sambandi við eina komandi oljuvinnu.




*Undir framsýningini í Stavanger varð eisini høvi at vitja okkurt av oljufeløgunum har. Her vitja Sofus og Svein høvuðsborgina hjá Phillips. Ein av stjórunum, Jakob Rugland, sum eisini er umboðsmaður hjá Phillips í Føroyum er vertur. Mynd Jan*

Sofus Gregersen sigur, at umboð fyri Kværner umhugsa at vitja í Føroyum og heldur hann sjálvur, at tað eisini hevur stóran týdning, at slík útlendsk feløg fáa samband við virki í Føroyum, um hetta kann bera í sær, at ein møgulig samvinna kann ganga báðar vegir.

Tað er greitt eftir slíka ferð, at tíðarhorisonturin er langur. Tað er ikki nakað, sum hendir her og nú. Men málið hjá okkum í dag er at royna at vera við í eini verandi oljuvinnu í útlandinum og kunna gera okkurt smátt, sum vit eru førir fyri í samráð við virki har. Harvið kunnu vit vera uppá forkant við ta oljuvinnu, sum møguliga verður her.

Sofus Gregersen sigur, at tað eru væl givnir pengar at vera við á eini slíkari oljumessu, og hann er rættiliga bilsin av, at ikki fleiri vinnulívsfólk úr Føroyum eru við.

Eg skilji heldur ikki, hví ikki fleiri politikarar troyta eitt slíkt høvi, um ikki ann-

➤

